VALGREINAR

Bústaðar-politikkur

Tummas Lauritsen

Hjá flestu húskjum er einasti møguleiki at fáa sær bústað, at byggja ella keypa egin sethús, sum í allar flestu førum eru stakhús. T.e, ikki sambygd. At hetta er dýrur byggiháttur, bæði hjá einstøku familjuni, fyri ikki at tala um: hjá tí einliga, og fyri samfelagið sum heild, kunnu vit skjótt verða samd um.

Fyri samfelagið er hetta dýr loysn, tí hvør bústaðareind krevur fleiri metrar av vegi, kloakkum, kaðalum o.s.fr. í mun til tættari bygging. Raðhúsum nýtist bert 2 útveggir, og byggja vit í 2 ella 3 hæddum, kann samsvarandi tal av bústaðum vera undir somu tekju, eins og byggibúning er felags. At tílík tøtt bygging eisini hevur sosialar fyrimunir er ein royndur lutur.

Fyritreytir

At skapa fyritreytir fyri skilagóðari bygging er fyrst og fremst eitt kommunalt mál, tí tað krevur at nóg mikið av tøkum lendi er, sum er gjørt byggibúgvið á skilagóðan hátt. Og tað merkir, at bæði fyrireiking og anleggsarbeiði eru gjørd til lítar.

Tað er her, í byarskipanarhøpi, at avgerðin verður tikin, hvat slag av bústaðarbygging vit fáa. Vit eiga ein stóran og vaksandi hóp av stakhúsum í Føroyum. Nú er brúk fyri øðrum møguleikum eisini. Og her mega kommunurnar taka sær um reiggj, at skapa fortreytir við hóskandi byggiøki. Men bert byggiøki loysir heldur ikki trupuleikan, tí so leingi, sum einstaka familjan noyðist at vera byggiharri, verður eingin onnur loysn enn stakhús.

Aðrar loysnir

Hvat er so til ráða at taka? Í Danmark hevur verið arbeitt við kommunalum íbúðarfeløgum. Men hetta ber viðhvørt við sær, at summar eindir gerast getto fyri sosialt minni ment (tí at kommunan er eigari). Í Noregi hava tey sonevnd "boligbyggelag". Hetta eru iognarfeløg (eins og keypsamtøkur), sum vegna tey bústaðarsøkjandi, sum eru limir, reika fyri, fremja byggibúning og bygging av bústøðum í størri ella smærri eindum. Sum frálíður, gerast hesi feløg "professionellir" byggiharrar, sum kunnu fáa nógv fyri peningin til gleði fyri tey bústaðarsøkjandi.

Føroysk loysn

Hvussu er so hjá okkum? Tey íbúðarfeløg, sum higartil hava virkað, hava bert snúð seg um einstaka byggiætlan. Royndirnar eru tí í lítlan mun komnar seinni ætlanum til góðar. Hartil gjørdi kreppan í nítiárunum, at tað, sum var um at koma á føtur av slíkum royndum, steðgaði.

Men nú er at koma aftur á lagið! Hvussu gera vit so tað? Ein gongd leið kundi verið, at eitt nú Húsalánsgrunnurin, onkur av størru kommununum og (endiliga!) áhugaðir privatpersónar skipa eitt bústaðarbyggifelag. Vit kunnu eisini kalla tað eitt búfelag.

At gera slíka felagsbygging bert fyri lesandi ella bert fyri gomul ella bert fyri rørdslubrekað ella aðrar serstakar bólkar eru neyvan hyggjuráðini. Tí at goyma børnini fyri teimum gomlu – ella øvugt, ella tey lesandi fyri teimum yrkisaktivu verður ongantíð náttúrligt. Lat okkum heldur gera ein hóp av íbúðum fyri tey, sum ikki hava brúk fyri stórum bústaði. Harvið lættir tr?stið á marknaðin, og møguleiki er fyri, at prísirnir falla. Fær Húsalánsgrunnurin høvi at veita ód?ra, langfreistaða figging, kunnu slíkar íbúðir vera lagaligar at keypa ella leiga.

Hesin spurningur er í grundini als ikki ein spurningur um partapolitikk, sum nógv vilja gera hann til í hesum døgum, men ein spurningur um, at røttu viðkomandi finna saman við felags stevni og felags stevnu.

Til alt Guds fólk í Føroyum: Skal røddin tagna á tingi?

Vagn í Geil
Valevni Miðfloksins í Sandoynni

Eg vil heita á allar samkomur, og allar samkomulimir í Føroyum, um at standa saman í hesum eina, sum kemur at hava ein alstóran og avgerandi týdning fyri land og fólk okkara. Latið okkum fáa ein sterkan Miðflokk inn á ting, tí vit øll eru væl vitandi um, at tað er bert hesin eini flokkurin, sum torir at rópa eitt varskóð, tá í veruliga ástendur.

Hvat við teimum veiku í samfelagnum?

Hvør skal verða røddin hjá tí ófødda barninum?

Hvør skal rópa varskóð, tá ið lógir verða gjørdar, ið ikki samsvara við Guds samlaða orð?

Hvør skal siga nei, tá ið atkvøtt verður um ES?

Hvør skal verða har, tá ið spurningurin um tey samkyndu kemur fyri aftur?

Hvør skal verja rættin hjá tí trúgvandi?

Soleiðis kundu vit hildi áfram í tað óendaliga. NEI, latið okkum sum trúgvandi her á landi vísa kulør, latið okkum vísa øllum føroya fólki, at vit sum Miðflokkafólk meina tað, sum vit siga, og siga tað, sum vit meina.

Lat einki standa tær í vegin fyri at taka eina kvalitets avgerð, heldur ikki tað, ið eitur familju ella vinarpolitikk. Vit mugu standa á egnum beinum, hava egna fatan og meining, tá tað snýr seg um okkara kæra fosturland, sum vit øll eru so góð við.

Bíbliunnar grundvøllir

Hvussu síggja vit FØROYINGAR uppá tann Gud og skapara, sum vit siga okkum trúgva uppá?

Er Gud í veruleikanum tann, hann sigur seg verða? Er tað, sum hann sigur í sínum orði sannleiki, og hevur tað ævinleika eksistens í sær, antin vit føroyingar finna tað fyri gott ella ikki?

Trúgva vit føroyingar, at Gud kann grípa inn, um vit seta okkara álit á hann, og veruliga gera tað?

Ígjøgnum allar tíðir hava tað funnist menniskju, ið hava staði upp fyri sannleikanum, og hesi eru tey, ið hava gjørt allan munin í samfelagnum. Hesi menniskju hava trúð á ein Gud, sum er veruligur, persónligur og livandi. Í dag hevur ein hug at spyrja seg sjálvan: Hvønn sigur føroya fólk Gud verða? Er hann bara ein meining, ein ideologi ella ein tankaskipan, sum vit sjálvi vilja gera til veruleika, tá vit hava brúk fyri tí? Hvørja ávirkan hevur humanisman havt á føroyingin, og hvat byggir hon á? Humanisman er ein av teimum mongu ideologium, sum í dag er við til at forma tankalívið hjá menniskjum, uttan at vit gerða okkum far um tað. Tá ein tosar við tað unga fólkið í dag, far ein eina fatan av, at tey ikki hava tað stóru virðingina fyri Gudi. Hann er teimum veruleikafjarður og er blivin ein partur av øllum heimsins religiónum.

Hetta er júst tað, humanisman vil og altíð hevur vilja. Hon vil burturforklára og til einkis gera tann livandi eina sanna Gud.

Lat hetta ikki verða hugburðin hjá tí tilkomandi føroyinginum ! NEI, latið okkum byggja okkara land við sunnari fornuft og ikki uttan Gud, sum humanisman so gjarna vil ! Gakk ikki upp á kompromi við menniskju ! Sel ikki tína atkvøðu fyri 30 silvurpengar, fyri síðan at angra tað restina av valskeiðnum!

Lat hetta lesarabræv verða ein ringiklokka fyri teg, sum er trúgvandi her á landi!

Góða kvinna - Broyting av okkara javnrætti

Súsanna Dam
Valevni Sambandsfloksins í Suðurstreymi

Um fáar dagar verður løgtingsval, eitt val ið kann gerast ein vend í tilveru okkara, ikki bert á tjóðskaparligu støðuni, men ikki minst á tilveruni hjá kvinnum. Nærum øll tey mannligu valevnini hava lokkað við longdum barsli við góðari løn. Enn eitt gylt vallyfti lovar teimum kvinnum, sum velja at arbeiða heima, at tær skulu fáa figgjarligt endurgjald fyri hetta, sum sagt verður, alneyðuga og náttúrliga arbeiði hjá kvinnum. Uppaftur verri er, at teir longu hava gjørt seg inn á okkara áður givna rætt til at gjalda skatt eftir, hvussu nógv vit sjálvar vinna. Nú eru vit aftur viðfesti í lønina hjá húsbóndanum.

Menn hava givið skarvin yvir

Hyggja vit eftir hvør orsøkin er til tey føguru lyfti og ætlanir, sæst skjótt at alt stendst av, at teir menn, sum higartil hava havt nærum einarættin til at fyriskipa, og til at nýta okkara skattapening, fullkomiliga hava mist tamarhaldið á støðuni nú, heilt einfalt av teirri orsøk, at teir ongantíð áður hava sæð tørvin á at gera nakað við hetta. Men nú tá vit vaksnu at vísa seg hava uppgivið at geva okkara børnum og gomlu eina góða tilveru, skal hetta rættast við at beita kvinnurnar mest møguligt burtur av arbeiðsmarknaðinum. Sjálvandi fyri gott endurgjald og nógva fritíð. Sum ljóðar er tað best um kvinnur antin arbeiða innan heilsuverkið ella kanska hálvan dag við okkurt annað lættligt.

Er tað hetta vit vilja?

Er tað hetta vit vilja? hvat siga tær ungu kvinnurnar? Menn úr øllum flokkum hava hildið langar valrøður, sum beinleiðis leggja ábyrgdina av vaksandi trupulleikanum á øllum tí sosiala økinum á kvinnur. Men føroyskar kvinnur og børn teirra hava ongantíð livað av tí, tær virkaðu heima við hús. Føroyskar kvinnur hava altíð verið noyddar at arbeiða úti eisini, og mín vón er, at valið 30. apríl ikki fer at ávirka okkara rætt til frælst at velja millum allar møguleikar. At vísa seg, ætla menn sær at taka hendan rættin frá okkum nú, tí hevur tørvurin ongantíð áður verið størri at velja kvinnur, nógvar kvinnur, á ting.

Góða kvinna, hevur tú ongantíð hugsa um, hví pápar ikki fara av húsum á náttartíð og bera síni druknu smábørn heim í song. hetta hevði í hvussu so er, verið ein hjálp til at loysa ein hin allar størsta trupuleikan??

Halló, Halló.....hvussu verður við eftirlønini til landsstýrismenn v.m. nú vit fáa nýggja samgongu

Steindor Hjaltalin
valevni Miðfloksin í Suðurstreymi

Ja, vit vistu øll, at málið um eftirlønir til landsstýrismenn v.m. varð tikið upp í verandi samgongu. Eftirlønirnar skuldi hækka eini 60-70%. Málið varð fyrst víðka til eisini at umfata fráfarnar landsstýrismenn og síðani til at hava gildið aftur til 1951.

Málið bleiv væl móttikið av tingmonnunum, ið 2 ár frammanundan eisini høvdu fingið eini 60% í lønarhækkan. Men eftir mikla umtalu og innsavnan av undirskriftum, ið mótmæltu, varð málið afturtikið. Millum tey, ið ikki tóku undir við hesum var, til hennara rós, einkja eftir ein fyrrverandi løgmann, ið hevði fingið útgoldið túsundtals krónur um mánaðin, um lógin bleiv samtykt.

Miðflokkurin fer at raðfesta tey fremst, ið eru verri fyri peningaliga enn landsstýrismenn og tingmenn, so hesi fáa eina sømiliga eftirløn. Tí fer Miðflokkurin at arbeiða fyri, at peningurin, ið var tøkur til eftirlønina hjá landsstýrismonnum v.m., verður brúktur til tey, ið treingja hann meiri.

Vit fara at arbeiða fyri at avlamispensjón, fólkapensjón, einkjupensjón og einkjumannapensjón hækka.

Gev okkum møguleika til hettar við at seta X við lista H valdagin.

VALGREINAR

Miðflokkurin hevur prógvað, at tilber at reka politikk, sjálvt í andstøðu

Jónfinn Olsen
Form. í Ufm & Valevni Miðfloksins í Suðurstreymoy

Kann nakar annar flokkur vísa á tað seinastu 4 árini?

Miðflokkurin hevur seinastu 4 árini arbeitt mannliga fyri teg sum Føroying.

Umboðsmaðurin:

Politikkarar hava roynt síðan 1979 at elva uppskot um umboðsmann.

Í seinasta vælskeiði evnaði Miðflokkurin lógina til, og henda lóg bleiv samtykt. Nærum dagliga hoyrast úrslit av virksemi stovnsins. Hetta kemur tær sum vanligur borgari í hesum samfelagi til góðar. (Minst til at Miðflokkurin var ikki í samgongu, men í andstøðu, álíkavæl arbeiddu vit til frama fyri teg sum BORGARA. Hetta skuldu allir flokkar roynt at gjørt).

Fjølmiðlamonopolini:

Við miðvísari bøn, og politiska virkseminum hjá Miðflokkinum eydnaðist at fjølmiðlamonopoli var avtikið. Í dag kanst tú sum borgari gleðast um at

· LINDIN er ein veruleiki
· RÁS 2 er ein veruleiki

Og ivaleyst hevur tú okkurt spennandi at gleða teg til á hesum øki afturat. (MIĐ FLOKKURIN hevur siti í andstøðu, og álíkavæl ber til at reka politikk til frama fyri teg sum borgara. Vit í Miðflokkinum nýtast ikki at biða, til vit koma í samgongu, tí vit meina, at tú sum borgari altíð skalt kenna teg tryggan, tá vit sita á løgtingið, í samgongu ella ikki. Gera hinir flokkarnir tað sama, hygg hvat er hent tey seinastu fýra árini?).

Onnur monopol:

Fleiri monopolstovnar hava verið í okkara landi, men í dag er øðrvísi, tí Miðflokkurin hevur siti á Løgtingið. Hugsa um

· At vit í dag hava fleiri Tryggingarfeløg
· At vit í dag hava fleiri Telefonfeløg

Hetta hevur givið tær sum brúkara eitt betri tænastustøði og bíligari gjald fyri tær tænastur, ið tú sum brúkari fær í dag.

Tú sparir pening í dag á hesum øki, tí MIĐ FLOKKURIN huksar um teg sum borgara í hesum vakra samfelagnum Føroyum.

Kundi tú hugsa tær ein flokk, sum hugsar um teg

VEL MIĐFLOKKIN – VEL MIĐ FLOKKIN tín flokkur.

MIĐFLOKKURIN TÍN RØDD Á LØGTINGIĐ.

Góðu veljarar!!

Sigfríður Dam Olsen,
valevni Javnaðarfloksins í Vágum.

Løgtingsvalið týsdagin er eitt sera týdningarmikið val. Tá fara vit at gera av, um vit í fýra ár aftrat skula halda áfram at kasta eftir hvørjum øðrum við fullveldisrunubløkum, ella um vit skula finna eina virðiliga og endaliga loysn av ríkisrættarliga spurningin innan fyri ríkisfelagsskapin.

Tá fara vit at gera av, um vit framhaldandi skula lata týðandi øki av okkara valferðaskipanum liggja í órøkt, ella um vit veruliga skula seta lívskorini hjá vanliga fólkinum fyrst.

Javnaðarflokkurin vil loysa ríkisrættarliga spurningin við uppskotinum um eina sjálvstýrislóg, sum er ein trygg og virðilig skipan innan fyri ríkisfelagsskapin.

Javnaðarflokkurin hevur eisini sett sær fyri, at í komandi valskeiði skulla lívskorini hjá fólkinum setast ovast á skránna. Við valskránni "Fólkið fyrst" seta vit fólksins lívskor í miðdepilin.

Javnaðarflokkurin stóð á odda fyri menningini av føroysku valferðini stóran part av farnu øld, og vit bjóða okkum fram til at halda áfram, nú vit hava sett hol á nýggju øldina.

Vit hava gjørt eina ítøkiliga valskrá, soleiðis, at veljarin ítøkiliga veit, hvørji úrslit verða at síggja um fýra ár. Javnaðarflokkurin hevur givið veljaranum sítt orð, og vit vilja, at tit taka okkum uppá orðið.

Fyri framman liggur á okkum ein stór ábyrgd. Tað góða samfelagið kemur ikki av sær sjálvum, men bert við einum stórum og sterkum Javnaðarflokki, sum hevur styrki til at taka tøkini til frama fyri eitt samfelag, har samhaldsfesti og virðing fyri okkara samborgarum verður sett í hásætið.

Eitt samfelag, har vit hava umsorgan fyri hvørjum øðrum, og sum gevur hvørjum einstøkum av okkum møguleikar til eitt frælst og frítt lív. Hetta er tað frælsið, sum altíð hevur staðið , og altíð fer at standa fyri.

Góðu Vágafólk! Vit kunnu gera munin. Latið okkum saman gera løgtingsvalið í Vágum til eitt javnaðarval.

Í faldaranum, sum FS Vágar gav út ár 2000, skrivaði eg eina yrking um Vágoynna, og fari eg at loyva mær at enda við at lesa hana.

Stolt, stinn og sterk,
satt meistaraverk
Vart myndað av Skaparans hond.
Sí, bjørgini brøtt !
Og vøtnini tøtt !
Væl vallað frá fjalli til strond.
Á sumri tú klødd ert í fagrasta lín,
eg fegnist, at tú gjørdist heimstaður mín,
Vágoy, ein kvøða til tín.

Brimbard, tó blíð,
so føgur og fríð,
tú gevur mær megi og mót.
Várt verk sýna skal,
vit vilja tær væl:
Sæst gróður um gangandi fót.
Um fáment vit eru, vit seta várt mið:
Vit fylkjast og mennast, vit øll lið í lið
vit vísa, at Vágoy skal við.

Sameind í stríð,
ein bjartari tíð
sæst skyggja - er ei hvørvisjón.
Mong søga er søgd um fedranna brøgd,
vit seta í verk vára vón.
Tey gomlu tey stríddust,
hvør gav teimum rós ý
Við teimum í huga vit seta ta kós.
Tá Vágoy gerst framtíðin ljós.

Er sosialt rættvísi ein sjálvfylgja?

Nei, ikki uttan Javnaðarflokkin

Kristian Magnussen
løgtingslimur og valevni fyri Javnaðarflokkin

Fólkið í Tórshavn royndi í seinru helvt av 19. øld at fylkjast fyri at tryggja sær livilig kor, men vert er at minnast, at mótstøðan var so stór móti verkafólkinum tá, at fýrati ár gingu, áðrenn Havnar Arbeiðsmannafelag kundi stovnast í 1916.

Mótstøðan móti arbeiðandi fólkinum í dag er meira raffinerað. Fólkaflokkurin tosar um lágar lønir og skattalætta. Undanførslan er, at hetta skal tryggja landsins kappingarføri - les, so teir kunnu forvinna meira. Tá einki er at skatta av, hvønn fyrimun fær fólkið tá. Eru fólkafloksleiðararnir lágløntir? Liva teir upp til sínar egnu hugsjónir? Nei, tvørturímóti. Teir hava hópin av partafeløgum og rinda í besta føri bert lítlan skatt, hóast stóran vinning. Hví lat hendan samgongan ikki skattalætta til alt fólkið, men bert til partafelogini. Tað var ikki fyri at stimbra vinnulívið, men bert fyri at nøra at sær. Tað er ikki Palleba, ið dagliga stovnar partafeløg, likviderar tey og verður saneraður.

Gerst tú arbeiðsleys/ur í longri tíð, ella verður tú óarbeiðsfør/ur, stendur illa til. Ert tú gift/ur, verður tú noydd/ur at liva av hjúnaðarfelagnum, til hjúnarbandið slitnar, av tí at tit bæði eru vorðin útarmað, ert tú ikki farin í hundarnar innan ta tíð. Soleiðis er eisini við einligum forsyrgjarum. Eitt lítið óhapp og tilveran rapar.

Í februar í ár minkaði samgongan veitingarhámarkið í forsorgarlógini, uttan himpr, við ivasamari og ógreiðari lógarheimild, við millum 1000 og 1300 kr. um mðr. Ongin í samgonguni harmaðist og varnaðist. Eg reiðsti málið á tingið fyri deyvum samgonguoyrum og í landsstýrismálanevndini, har tað tíverri ikki varð liðugt viðgjørt, nú valið varð útskrivað.

Hendan samgongan hevur marginaliserað tey óhepnu og latið tey gingið frá Pontiusi til Pilatus. Ov líti av skipaðari hjálp, minkandi veitingar og eingi vard støvr.

Tey tosa um gyltar tíðir, men tiga, tá tíni viðurskifti hava ábøtur fyri neyðini.

Lat hetta fáa ein enda tann 30. apríl 2002. Javnaðarflokkurin veit, hvat skal broytast í almannalóggávuna og ræðist ikki fyri at gera tað beinanvegin. Tú gert tað sjálv/ur av við atkvøðu tíni.

Gott val.